# Stuðlar Svimjisambandinum í tvey ár afturat

Atlantic Airways og Svimjisamband Føroya hava skrivað undir nýggja stuðulsavtalu, sum ber í sær, at føroyska flogfelagið verður høvuðsstuðul hjá Svimjisambandi Føroya komandi tvey árini. Væl hevur gingist føroyskum svimjarum farnu tvey árini, meðan Atlantic Airways hevur verið høvuðsstuðul hjá Svimjisambandinum. Árið 2008 var søguligt, serliga tí Pál Joensen vann trý gullmerki í evropmeistarakappingini fyri juniorar í Beograd og gjørdist ársins ítróttarnavn í Føroyum. Tá Pál Joensen og hini í ferðalagnum komu til Føroya eftir avrikið í Beograd í august, handaðu umboð fyri Atlantic Airways Svimjisambandi Føroya eina tilsøgn um, at stuðulssáttmálin kundi longjast í tvey ár. Tað er hendan avtalan, sum nú er staðfest. - Vit stuðla fegin føroysku svimjarunum í tvey ár aftrat, tí teirra avrik eru til fyrimyndar fyri okkum øll, sigur Magni Arge, stjóri í Atlantic Airways.




# Stríðið ímóti rúsevnunum í Føroyum afturútsiglt

**- Vit mangla týdningarmikil amboð í stríðnum ímóti rúsevnasmugling í Føroyum og lógin er avoldað. Tað ger tað óneyðuga tórført at basa smuglingini, sigur Bergleif Brimvík, leiðari á kriminaldeildini hjá løgregluni**



*Skal stríðið ímóti rúsevnum verða nóg effektivt, er neyðugt, at løgreglan og tollvaldið fáa neyðugu amboðini, men her hava føroyskir myndurgleikar ikki fylt við tíðini, sigur Bergleif Brimvík, leiðari á kriminaldeildini hjá løgregluni*

RÚSEVNI

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Vit gera tað, sum gerast kann, fyri at basa rúsevnasmuglingini til Føroyar.

Tað sigur Bergleif Brimvík, leiðari á kriminaldeildini hjá løgregluni.

Men hann leggur samstundis dent á, at umstøðurnar til at basa smuglingini kundi verið nógv betri enn tær eru.

Tað, sum hann serliga hugsar um, er, at politiski myndugleikin leingi hevur forsømt at seta lógir og reglar í gildi í Føroyum, sum høvdu gjørt tað lættari hjá løgregluni at stríðst ímóti rúsevnasmuglarum.

## Dyggiliga afturútsigld

Tað, sum Bergleif Brimvík hugsar um, at føroyskir myndugleikar í mong ár fullkomiliga hava forsømt at dagført rættargangslógina.

- Tað er mín vón, at politiski myndugleikin tekur sær um reiggj og fær rættargangslógina dagførda.

Danir hava dagført rættargangslógina í nógvum umførum og hann skilir ikki rættiliga, hví tað skuldi tikið so langa tíð at dagført hana í Føroyum. Heilir átta kapittlar í lógini, sum umfata arbeiðið hjá politinum, eru ikki dagførdir í Føroyum og aðrir kapittlar mangla heilt.

Hann nevnir í hesum sambandi møguleikarnar hjá løgregluni at taka og goyma DNA royndir, at kanna fólk og ymiskt annað.

Hann sigur, at ein máti kundi verið at sett nýggjastu donsku lógina í gildi, men so at lagað einstakar greinar til føroysk viðurskifti, skuldi tað verðið neyðugt.

## Betri sømdir hjá telefeløgum

Men hann heldur eisini, at lógin, sum telefeløgini virka undir, eigur at verða dagførd.

- Løgreglan hevur brúk fyri ávísari útgerð í sambandi við telefeløgini.

Hann vil ikki í smálutir við, hvat hann hugsar um, men hann sigur, at millum annað hevur tað nakað at gera við møguleikarnar at lurta eftir telefonsamrøðum.

- Her er talan um útgerð, sum hevur heilt avgerandi týdning í arbeiðnum fyri at bremsa rúsevnasmuglingini.

Talan er um útgerð, sum kostar 1 - 2 milliónir.

Men higartil hava telefeløgini noktað at goldið fyri hesa útgerð, tí tey tíhalda um, at tey fingu teleloyvi, áðrenn tað varð krav, at tey skuldu útvega sær hesa útgerðina, sigur Bergleif Brimvík.

Aðrastaðni er tað skylda, at telefeløgini útvega sær hesa útgerðina, men afturfyri rindar løgreglan so fyri brúkið.

Tí heitir Brimvík eisini staðiliga á politisku myndugleikarnar um at dagføra lógina, sum telefeløgini virka undir.

## Narkohundar í serflokki

Í aðrar mátar er tollvaldið og løgreglan betri fyri.

Tollvaldið hevur havt tveir narkotikahuhndar, sum eru heilt í serflokki.

- Tá ið teir hava verið til roynd uttanlands, hava teir altíð staðið serstakliga væl, sigur Kjartan Dam, Joensen, yvirtollari.

Nú hava tey so fingið ein hund afturat, so nú eru tilsamans tríggir narkotikahundar í Føroyum.

Teir verða brúktir til at leita eftir rúsevnum, bæði uppi á ferðafólki, í posti, í farmaflutningi og umborð á skipum.

Harumframt hevur tollvaldið røntgentól á posthúsinum í Havn at kanna post í, umframt at tey eisini hava atgongd til røntgentól á flogvøllinum at kanna lutir við, sum rúsevni kunnu vera fjald í.

Tað nýggjasta er, at tollvaldið nú hevur fingið beinleiðis atgongd til ferðafólkalistarnar hjá Norrønu og Atlantsflogi og tað ger tað munandi lættari at fylgja við, hvør ferðast til og úr Føroyum og um tað er nakar, sum ferðast mistonkiliga ofta.

- Hetta er eitt amboð, sum er avgerandi neyðugt fyri at hava eitt neyvt eftirlit við ólógligum innflutningi av rúsevnum, sigur Kjartan Dam Joensen.

| | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|
| Hassj | 3056 gr. | 5693 gr. | 4727 gr. | 1520 gr. | 2245 gr. |
| Amfetamin | 97 | 13 | 255 | 829 | 132 |
| Kokain | 0,10 | | 4,60 | 1 | 21 |
| Heroin | 0,30 | | | | |
| Marihuana | 187 | 17 | | | |
| Speed | | | | | |
| Ecstasy | 30 stk. | 537 stk. | 335 stk. | | 67 stk. |
| MDMA | | | | 982 gr. | |

*Hetta er nøgdin av rúsevnum, sum tollvald og løgregla hava lagt hald á seinastu árini. Øll tølini eru í gramm, uttan ecstasy, sum er tal av tablettum, sum hald er lagt á*

# Løgreglan heldur stand í stríðnum ímóti rúsevnum

**At døma eftir tí, sum tollarar og løgregla leggja hald á, er støðan viðvíkjandi rúsevnum í Føroyum ikki versnað hesi seinastu árini**

RÚSEVNI

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Støðan viðvíkjandi rúsevnum í Føroyum, er ikki versnað seinasta árið.

Tað heldur Kjartan Dam Joensen, yvirtollari.

Hetta byggir hann á tær nøgdir av rúsevnum, sum hald verður lagt á.

Nøgdirnar, sum hald er lagt í fjør, er í summum førum nakað størri enn í 2007, men í nógvum førum væl minni enn árini frammanundan sum heild.

Í fjør vóru 30 fólk tikin fyri at smugla rúsevni til Føroya og í ár er talið áleið tað sama, kanska okkurt einstakt fólk fleiri.

Nógv teir flestu smuglararnir eru mannfólk.

Tey flestu, sum smugla, goyma rúsevnini í postsendingum ella í viðførinum, men tað er eisini vanligt, at ferðafólk goyma tað uppi á sær.

Men ein máti at smugla upp á, sum vindur meiri og meiri upp á seg, er at goyma rúsevnini innvortis, bæði hjá mannfólki og konufólki. Í hesum føri er aloftast talan um smærri nøgdir, men hinvegin er talan ofta um evni, sum eru sterkari enn hassj.

Eisini Bergleif Brimvík, leiðari á kriminaldeildini hjá løgregluni staðfestir, at eftir nøgdunum at døma, sum hald verður lagt á, er støðan ikki versnað.

Men hann leggur samstundis dent á, at tølini eru ómetaliga svingandi, tí av tí at talan sum heild er um ein lítlan marknað, er stórur munur á, hvat hald verður lagt á frá einum ári til annað.

## Toppurin á ísfjallinum

Men bæði tollarin og løgreglumaðurin eru fullgreiðir yvir, at tað, sum hald verður lagt á, er bara ein lítil brotpartur av tí, sum verður smuglað til landið.

- Tað er ongin ivi um, at hetta bara er toppurin á ísfjallinum, sigur Bergleif Brimvík.

Men kortini eru teir sannførdir um, at stríðið ímóti rúsevnum, ger góðan mun.

- Tá ið vit leggja hald á eina ávísa nøgd av rúsevnum, síggja vit tað aftur í prísunum á svarta marknaðinum, tí tá hækka teir og tað merkir, at útboðið er minkað, sigur Bergleif Brimvík.